## Fleiri og fleiri bilar í Kina



Kinesarar keypa bil sum ongantíð fyrr, og tað eru serliga teir kinesisku bilarnir, sum ganga sum heitt breyð. Kinesisk bløð skriva, at fyrra hálvár seldu tær kinesisku bilverksmiðjurnar ikki færri enn seks milliónir bilar á heimamarknaðinum. Frank Gong hjá JP Morgan sigur við Reuters, at bilatalið veksur serliga skjótt í teimum meðalstóru býunum, og sjálvur væntar hann, at tann stóra bilasølan fer at standa við. Frank Gong sigur, at í juni keyptu kinesarar 1.140.000 bilar, og tað var 36 prosent meiri enn í juni í fjør. Goldman Sachs væntar, at kinesiska bruttotjóðarframleiðslan fer at veksa 7,8 prosent í ár.

## Fiskivinnan má umskipast

Grønlendska arbeiðsgevarafelagið mælir nú myndugleikunum til at umskipa alla fiskivinnuna sum skjótast fyri at tryggja lívgrundarlagið hjá tí einstaka fiskimanninum, sum felagið tekur til. Henrik Leth, stjóri í arbeiðsgevarafelagnum, sigur við KNR, at tíðin er farin frá stuttskygdum stuðulsskipanum, tí tær eru við til at varðveita ein avoldaðan bygnað, sum forðar fyri einari neyðugari menning. Hann leggur afturat, at tíðin er farin frá teimum sokallaðu lappaloysnunum. Henrik Leth sigur, at skal fiskivinnan hava beinleiðis ella óbeinleiðis stuðul, so skal endamálið vera at tryggja ein nýggjan bygnað, sum kann útvega vinnuni inntøkumøguleikar í framtíðini.



*Jóannes Eidesgaard heldur, at fakfeløgini hava hvørki víst ábyrgdarkenslu ella samhaldsfesti eftir at tey í gjár boðaðu frá, at tey góðtaka ikki, at lønarhækkingin í heyst verður strikað. Men landsstýrismaðurin ætlar at taka eitt nei fyri eitt nei hóast tað merkir, at kreppupakkin hjá samgonguni fekk eitt alvorligt skot fyri bógvin*

# Eitt alvorligt skot fyri bógvin

**Jóannes Eidesgaard ásannar, at límið, sum heldur kreppupakkanum saman, er farið at loysna eftir at fakfeløgini ikki vildu góðtaka at útseta lønarhækkingina til næsta ár**

KREPPUPAKKI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg hevði væntað, at fakfeløgini fóru at vísa størri ábygdarkenslu og størri samhaldsfesti.

Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, ásannar, at tað kom ógvuliga dátt við, tá ið fakfeløgini í gjár boðaðu honum frá, at tey góðtaka ikki at útseta lønarhækkingina upp á 3%, sum tey eiga í oktober eftir sáttmálanum.

Hann viðurkennur eisini, at hetta er eitt stórt bakkast í royndunum at finna semju um ætlaða kreppupakkan hjá samgonguni.

Lønarsteðgurin var ein týðandi partur av kreppupakkanum og nú fakfeløgini ikki vilja góðtaka tað, er kreppupakkin so mikið longri burtur.

### Tekur eitt nei fyri eitt nei

Kortini leggur hann afturat, at hann tekur eitt nei fyri eitt nei og hann fer ikki at gera eina nýggja roynd at fáa fakfeløgini at góðtaka lønarsteðgin.

Hann staðfestir somuleiðis einaferð enn, at hann fer ikki at leggja uppskot fyri Løgtingið um lønarsteðg.

- Eg ætli mær at virða tær frælsu samráðingarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Men hann skoytir upp í, at við einum og hvørjum frælsi, fylgir ein ábygd.

- Og eg vildi ynskt, at fakfeløgini vístu størri ábyrgd og samhaldsfesti ímóti samfelgnum í teirri serligu støðu, vit eru í, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann staðfestir, at ætlanin var jú ikki at strika lønarhækkingina, men einans at útseta hana í eitt ár.

- Tað merkir, at løntakarin kundi liva næsta ár á sama støði, sum í ár, ella kanska enntá eitt sindur betri, tí seinasta uppgerðin yvir prístalið vísir, at prísirnir eru lækkaðir í seinastuni, so tað er hóast alt eisini blivið eitt sindur bíligari at liva í seinastuni.

### Alvorligt skot fyri bógvin

Og nettupp tað, at fakfeløgini eftir hansara tykki ikki vildu vísa samfelagsábyrgd og samhaldsfesti, vigar líka tungt í hugaheiminum hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum sum tann eykaútreiðsla, lønarhækkingin hevur við sær fyri landskassan.

- Grundstøðið hjá okkum hevur verið, at tað skal vera eitt felags átak hjá øllum samfelagsbólkum at venda skútuni, sigur hann.

Og hann væntar, at nú ein stórur samfelagsbólkur sum tey almennu fakfeløini, tvíhalda um at fáa betri livikor næsta ár, fer tað at verða serliga torført at fáa aðrar samfelagsbólkar at góðtaka ein niðurskurð.

Í hesum sambandi kann vísast á, at ætlanin hevur verið at skerja bæði sjómannafrádrátt, rentufrádrátt, sjómenn undir DIS og at leggja eyka skatt á inntøkur yvir 400.000 krónur.

- Tað harmar meg, at fakfeløgini ikki vilja vera við, tí tað hevði gjørt tað nógv lættari at halda yvirskipaða endamálið hjá samgonguni um at næsta ár skal føroyska samfelagið rekast fyri sama prís sum í ár.

- Tað samhaldsfasta grundsjónarmiðið fekk eitt alvorligt skot fyri bógvin, staðfestir hann.

Hann sigur, at eftir ætlan skuldi kreppupakkin límast saman við samhaldsfesti, men tað límið er loysnað.

### Munandi tórførari

Nú vil landsstýrismaðurin ikki siga, hvussu verður við fíggjarlógini næsta ár.

- Tað verður helst tórført at sleppa heilt undan at hækka raksturin næsta ár. Men hvussu nógv raksturin hækkar, er vónleyst at siga og tað ber heldur ikki til at siga um øll lønarhækkingin verður játtað á fíggjarlógini.

Jóannes Eidesgaard sigur, at í síðsta enda er tað Løgtingið, sum samtykkir fíggjarlógina og tað er fyrr hent, at fíggjarnevndin hjá Løgtinginum hevur skert játtanir á fíggjarlógini.

Sama, hvat búskaparfrøðingar siga, heldur Jóannes Eidesgaard fast um, at tað er neyðugt at tálma vøkstrinum í útreiðslunum, tí hann hevur verið alt ov stórur seinastu árini.

- Endmálið hevur ikki verið at seta beinleiðis sparingar í verk, men einans at tálma vøkstrinum. Lønarsteðgurin var ein týðandi táttur í hesum, men nú hann er dottin á gólvið, er málið um steðga vøkstrinum í rakstrinum longri burtur, staðfestir Jóannes Eidesgaard.

Hann vónar ikki, at hetta fer at seinkað pakkanum, tí hann er ivaleysa seinur, sum er.

Menn viðgongur eisini, at støðan hjá fakfeløgunum hevur gjørt uppgávuna munandi tórførari.